Herbert breyt beinið

Fyri B68 er tað stórur missur, at miðverjin ikki verður førur fyri at spæla nógvu tær næstu vikurnar, men Herbert vónar, at hann um tríggjar vikur aftur kann fara undir venjingarnar

ÓHEPPIN B68 SPÆLARI
Jóannes Hansen

Tað hevur ikki gingið væl hjá B68, og tá ið tað nú tóktist sum um, at tað skuldi gleppa og glottar vóru at hóma, so var óeydnan aftur mein.

Ein tann mest eyðsýndi B68 spælarin í UEFA Cup dystinum á Svangaskarði hóskvøldið var Herbert í Lon Jacobsen í miðverjuni. Fríggjadagin varð greitt, at hann verður ikki at síggja á vøllinum – í hvussu so er tríggjar tær næstu vikurnar.

Í fyrsta álopinum taklaði hann. Mótstøðumaðurin var seinur, og hann tóktist heilt klárt gera fríspark ímóti Herberti, sum tóktist fáa rættuliga ilt og varð liggjandi í eina góða løtu. Men kortini lætst dómarin ikki um vón. Hann metti ikki, at mótstøðumaðurin hevur forbrotið seg.

Herbert varð á børu borin av vøllinum. Fysioterapeuturin hjá B68, Øssur Steinhólm, viðgjørdi hann í einar fimm minuttir, og so spældi Herbert restina av tíðini á tamb.

Nógva pínan og nógv hovnaði fóturin aftaná lokið stríð hevði við sær, at Herbert fríggjadagin varð til kanningar á landssjúkrahúsinum. Har var dómurin, at eitt bein í fótliðnum var brotið, og at liðbondini rundanum vóru nógv toygnaði. Í fyrsta umfari vóru boðini frá læknanum, at Herbert ikki verður førur fyri at spæla fótbólt í tríggjar vikur.

– Eg hevði als ikki roknað við hesum. Tá ið eg varð eftirtaklaður, fekk eg ógvuliga ilt. Men pínan hvarv so við og við, og tað bar til at spæla, sjálvt um eg væl kendi til pínuna. Fram ímóti dystarenda hevði eg aftur ógvuliga ilt, og aftaná var tað sjónligt, at okkurt var galið. Eg hugsaði um liðbondini, men tað var ikki í mínum tonkum, at eitt bein var brotið, sigur Herbert í Lon Jacobsen, sum ikki er gipsaður, men í staðin hevur fingið ein serligan sokk, ið stuðlar, tá ið hann verður blástur upp.

Tað gekk annars væl hjá tær hóskvøldið?

– Soleiðis kendi eg tað eisini. Tað harmar meg ógvuliga nógv, at eg ikki havi møguleika at hjálpa til í Letlandi og ímóti KÍ og GÍ í landskappingini. Eg vóni, at tað síðani fer at bera til at spæla, men eg dugi sjálvandi einki at siga um hetta enn.

Tríggjar vikur steðgur orsaka av beinbroti, tað er styttri, enn tað plagar at vera?

– Tey, sum eg havi tosað við, siga sum við ein munn, at tað plaga at ganga í hvussu so er seks vikur. Men eg haldi meg til tað, sum læknin segði, og eg vóni, at hann fer at fáa rætt. Sum eg havi skilt tað, so er talan um lítið brot, sum liggur væl, sum tað plagar at verða tikið til.

Hvat mót hevur tú annars um lagnuna hjá nýggja felagnum hjá tær?

– Á stigatalvuni sær tað einki serligt út. Men eg haldi kortini, at tað eigur at bera til at sleppa undan niðurflytingini. Hesar seinastu vikurnar hevur talan verið um at samanspæla eitt lið við toluliga støðugum buli. Tað er neyðugt, um nakað skal spyrjast burturúr, at nógvir teir somu spæla hvørja ferð, og at tað ikki eru ov nógvar skiftingar, soleiðis at spælararnir koma at kenna hvønn annan. So vit mugu vóna, at talan ikki verður um fleiri óhapp av tí slagnum, sum var mær fyri hóskvøldið, heldur Herbert í Lon Jacobsen.



Saknurin í Herbert í Lon Jacobsen h.m. verður óivað stórur í B68, nú sterki verjuleikarin breyt beinið í dystinum ímóti lettiska Ventspils hósdagin.

mynd: Jens Kr. Vang

Fram longri frá bjargingini

Føroyska felagið í íslendska høvuðsstaðnum tapti enn eina ferð, og tá ið ein av kappingarneytunum samstundis fekk fulla úrtøku sær tað rættuliga svart út

ÍSLAND
Jóannes Hansen

Tað hevur ikki sæð nakað serligt út hjá Fram, og nú teir um vikuskiftið hava verið í eldinum fyri ellintu ferð í landskappingini, er støðan uppaftur verri.

Fróði Benjaminsen, Hans Fróði Hansen og liðfelagarnir høvdu sunnudagin vitjan av ÍBV úr Vestmannaoyggjunum. Gestirnir fóru avstað við øllum trimum stigunum. ÍBV vann 2-1, eftir at teir í steðginum høvdu verið á odda 2-0. Teir skoraðu fyrra málið í 2. minutti, og dygst undan steðginum øktu teir við brotssparki.



Rikharður Daðason minkaði um munin miðskeiðis í seinna umfarinum. Men tað eydnaðist ikki Fram at fáa fleiri mál. Úrslitið hevði við sær, at ÍBV flutti fram á næstfremsta plássið. Fram fekk einki burturúr, teir eru aftast, og tað sær ikki væl út.

Støðan gjørdist uppaftur verri hjá Fram av, at triði aftasta liðið, sum er á plássinum, ið er tað síðsta, sum ber rætt at halda fram í deildini, fekk fulla úrtøku. Talan er um Víking, sum var á Akureyri, har teir vunnu 2-0. Harvið fekk Víkingur KA aftur, og nú eru hesi bæði feløgini lið um lið við fjúrtan stigum.

Fram hevur sjey stig, og Grindavík hevur tíggju stig. Grindavík skuldi spæla á heimavølli í gjárkvøldið. Teir skuldu fáa vitjan av ÍA og Juliani Johnsson. Um tey eydnaðist Juliani og teimum í gjárkvøldið at fáa fulla úrtøku, so fluttu teir fram á næstfremsta plássið.

Oddaliðið eitur framvegis Fylkir. Teir skuldu í gjárkvøldið spæla í ellinta umfarinum á Hafnafirði ímóti FH, sum eftir tíggjunda umfarið var nummar tvey og sunnudagin misti plássið - fyribils í hvussu so er - til ÍBV.

Sum vit áður hava sagt, so hevur Fram fyri stuttum skift venjaran út. Í royndini at styrkja um liðið til sjey teir síðstu landskappingardystirnar, gjørdu teir sunnudagin avtalu við danska álopspælaran Martin Beck Andersen. Fyrsta ferðin, hann fer at fáa møguleika at royna seg á liðnum hjá Fróða Benjaminsen og Hans Fróða Hansen verður, tá ið teir skulu spæla á útivølli ímóti Juliani Johnsson og ÍA.

Favorittarnir sigraðu

Tað vóru favorittarnir undan stóru Marathon kappingini í Havn leygardagin, sum fóru avstað við sigrinum.

MARATHON
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Undirtøkan var góð til stóru Atlantic Airways Tórshavn Marathon kappingina, sum var í høvuðsstaðarøkinum leygardagin. Hóast veðurgudarnir ikki allatíðina vístu seg frá síni bestu síðu, vóru bæði fyrireikarar og luttakarar væl nøgdir við kappingina.

Einki óvæntað úrslit

Sum vit nevndu her í blaðnum í farnu viku, vóru tað tey bæði, Cecil Weihe og Rigmor N. Arge, sum vóru favorittar at vinna kappingina hjá ávíkavist monnum og kvinnum. Favoritt-heiti livdu tey bæði eisini væl og virðiliga upp til, tí tað eydnaðist teimum báðum at vinna kappingina.

Umframt at tey bæði vunnu kappingina, eydnaðist tað eisini hjá bæði Cecil og Rigmor at seta nýtt føroyskt met. Tá ið Cecil vann kappingina í fjør, hevði hann tíðina 2.55.54, meðan hann í ár rann tann 42 kilometrar og 195 metrar langa teinin upp á 2.49.06. Altso nærum seks minuttir skjótari enn í fjør.

Rigmor N. Arge rann leygardagin sítt fyrsta marathon nakrantíð, og ikki kann sigast annað, enn at tað var gjørt við lít. Rigmor vann marathon-kappingina við tíðini 3.19.29, og tað er heilar 46 minuttir skjótari enn vinnaratíðin frá í fjør. Einans tríggjar kvinnur luttóku í marathon-kappingini í ár, men tær vóru allar tríggir undir vinnaratíðini seinasta ár. Til stuttleikar kann nevnast, at hevði Rigmor N. Arge tikið lut í kappingini hjá monnunum, so hevði endað sum nummar fýra í samlaðu støðuni.

Góð undirtøka

Skipað varð eisini fyri kapping á hálvum marathon, og her vann favorittur hjá monnum, Jonhard Larsen úr Treysti, ein tryggan sigur við tíðini 1.23.40. Hann var fimm sekund framman fyri næsta mannin, sum var Edgar Caballero úr Roysninum.

Hjá kvinnunum vann Ann Thomsen úr Bragdinum við tíðini 1.51.49, meðan norska Evelyn Kittelsen gjørdist nummar tvey ein góðan minutt aftan fyri Ann.

Eisini børnini sluppu at royna seg leygardagin, og undirtøkan millum tey smáu var sera góð, siga fyrireikararnir.

Gamlir garpar

Tað eru ikki einans yngri fólk, ið royna seg á longri renniteinunum. Millum luttakararnir á marathonteininum var eitt nú 79 ára gamli kanadiumaðurin, Wally Herman, sum kom á mál í tíðini 6.14.01, einar tjúgu minuttir aftan fyri javnaldran, Pierre Honnore, úr Danmark. At hesir báðir megna at renna teir góðu 42 kilometrar, hóast teir eru komnir so væl til aldurs, er einki minni enn eitt bragd.

Tríggir teir fremstu í marathonrenningini leygardagin, væl innballaðir í regnsløg eftir kappingina. Frá vinstru: vinnarin Cecil Weihe, nr. 3 Suni Jakobsen og nr. 2 Sigurd Justinussen

Úrslit kvinnur - hálvt marathon

1	1012	Thomsen Ann	1966	Bragdið	Faroe Islands	01:51:49
2	1032	Kittelsen Evelyn	1952	Knaben I.L.	Norway	01:52:52
3	1025	Tjørná Tina T.	1974		Faroe Islands	02:02:06
4	1011	Østerø Ann	1967	Bragdið	Faroe Islands	02:13:35
5	1002	Ricupero Maribel	1975		Venezuela	02:15:43
6	1034	Jakobsen Anna Rúna	1958	Bragdið	Faroe Islands	02:22:04
7	1035	Jógvansdóttir Marjun	1963		Faroe Islands	02:30:31

Úrslit menn - hálvt marathon

1	1027	Larsen Jonhard	1966	Treysti	Faroe Islands	01:23:40
2	1018	Caballero Edgar	1982	Roysnið	Faroe Islands	01:28:15
3	1006	Poulsen Verner	1959	SAS Løb og Mot.	Denmark	01:29:08
4	1031	Kittelsen Walter	1954	Knaben I.L.	Norway	01:33:02
5	1024	Nesá Arnfinnur	1986		Faroe Islands	01:36:39
6	1029	Kølleskov Henrik	1965	Bragdið	Faroe Islands	01:37:02
7	1021	Hjaltalin Steindor	1949	Bragdið	Faroe Islands	01:37:56
8	1033	Hansen Allan	1963		Denmark	01:38:15
9	1008	Højgaard Hanus	1960	Bragdið	Faroe Islands	01:40:06
10	1001	Christensen Fl. Gram	1976		Denmark	01:41:26
11	1028	Møllerhøj Jørgen	1946	Aarhus 1900	Denmark	01:42:23
12	1030	Hjelleset Lars	1946		Norway	01:44:57
13	1009	Sundskarð Pól	1957	Treysti	Faroe Islands	01:45:37
14	1007	Christoffersen Ivan Kjær	1973		Faroe Islands	01:46:35
15	1017	Petersen Flemming	1960	Roysnið	Faroe Islands	01:49:05
16	1010	Jakobsen Herluf	1963		Faroe Islands	01:49:28
17	1013	Nólsoy Páll L.	1965		Faroe Islands	01:49:46
18	1005	Clarlund Jan	1969	MIF	Faroe Islands	01:51:08
19	1019	Djurhuus an	1985		Faroe Islands	01:54:44
20	1014	Jakobsen Jan	1964		Faroe Islands	02:00:11
21	1015	Jensen Tommy Ole	1953	MIF	Faroe Islands	02:18:17
22	1004	Sandnes Ole Morten	1937		Norway	02:44:39

Úrslit - Marathon - menn

1	Weihe Cecil	1965	Bragdið	Faroe Islands	02:49:06
2	Justinussen Sigurð B.	1967	Bragdið	Faroe Islands	03:08:03
3	Jacobsen Súni	1967	Bragdið	Faroe Islands	03:17:57
4	Hansen Trygvi	1966	Bragdið	Faroe Islands	03:27:11
5	Gunnarstein Hjalti	1961	Bragdið	Faroe Islands	03:28:59
6	Joensen Andrass	1963	Bragdið	Faroe Islands	03:31:18
7	Jensen Erik	1972		Denmark	03:33:05
8	Joensen Tummas	1956	Treysti	Faroe Islands	03:34:29
9	Olsen Ólavur Herup	1943	Bragdið	Faroe Islands	03:36:11
10	Jakobsen Regin I.	1966	Bragdið	Faroe Islands	03:38:36
11	Ziska Djóni	1965	Bragdið	Faroe Islands	03:39:29
12	Kristoffersen Óla Jákup	1959	Bragdið	Faroe Islands	03:40:10
13	Vilhelmsen Robert	1951	Bragdið	Faroe Islands	03:41:39
14	Skaale Sjúrður	1967		Faroe Islands	03:44:12
15	Sondum Birgir	1961	Bragdið	Faroe Islands	03:48:48
16	Nilsson Urban	1966		Sweden	03:52:49
17	Hansen Harry	1938	Roysnið	Faroe Islands	03:53:55
18	Berg Jákup-Alberg	1963	Bragdið	Faroe Islands	03:55:42
19	Johansen Johan Pauli	1972	Bragdið	Faroe Islands	03:57:11
20	Festersen Tage	1966		Denmark	03:59:41
21	Hansen Hans Birgir	1949	Bragdið	Faroe Islands	04:03:02
22	Hansson Niels	1964		Faroe Islands	04:06:12
23	Petersen Janus	1959	Bragdið	Faroe Islands	04:14:54
24	Rasmussen Niels Juul	1970		Denmark	04:27:51
25	Preisler Horst	1935		Germany	04:40:50
26	Linklett Bent Tommy	1963	Bragdið	Faroe Islands	04:44:49
27	Lancucki Tadeusz	1949	100 Mar. Club	United Kingdom	04:49:41
28	Burns Peter	1947	Witham R. Club	United Kingdom	04:49:43
29	Jørgensen Erik Storm	1938	M.H.I.	Norway	05:00:05
30	Filtenborg Erhard	1939		Denmark	05:00:43
31	Davidsen Arni	1970		Faroe Islands	05:23:26
32	Honnoré Pierre	1926		Denmark	05:55:49
33	Herman Wally	1925		Canada	06:14:01

Útslit - Marathon - kvinnur

1	Arge Rigmor N.	1969	Bragdið	Norway	03:19:29
2	Í Eyðansstovu Soleyð	1979	Bragdið	Faroe Islands	03:57:23
3	Sørensen Britta H.	1946		Denmark	03:59:08

Sosialurin
Sosialurin i